Sig frá! Nýggjan samleika í 2013

Heildarætlanin fekk nýggjan samleika og snið

Boðskapurin var, at harðskapur á ongan hátt verður góðtikin í okkara samfelagi. Uttan mun til, um talan er um likamligan, sálarligan ella kynsligan harðskap vilja vit siga frá, at hann verður ikki góðtikin.

Tað er ein sannroynd, at tey, sum eru fyri harðskapi í parløgum og nærsambondum eru einsamøll. Eingin sigur sína hugsan, eingin spyr um bláa eygað – eingin sigur frá!

Tí er neyðugt og týdningarmikið at seta sjóneykuna á henda ósjónliga trupulleikan. Og fyrsta stigið er at bróta tøgnina – at siga frá!

Annika Olsen, landsstýriskvinna í almannamálum ásannar, at týdningarmesta fyribyrgingin móti harðskapi er opinleiki og kunnleiki. Hon heldur, at størsta fyribyrgingin er, at vit tosa um evnið:

- So sig frá! sigur landsstýriskvinnan, sum fegnast um, at verulig gongd er komin á hetta arbeiðið. ur eru skaðiligur, eins og løgfrøðingur fer at greiða frá fráboðanar- og tagnarskylduni.

Fyrilestrarnir eru almennir og ókeypis og viðkomandi fyri fakfólk eins og almenningin sum heild.